# TILTØK

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 við Annu og Jenis av Rana og tilbiðjunarmøti kl. 12 har Jógvan Z. talar um evnið: »Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – Týatira. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
Heimasíðan. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliuími og bønarløta. Páll Poulsen talar um 1. Mósabók, 3. kapitul – Trupulleikar í garðinum.
www.hebron.fo

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA. Kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Týsdagin kl. 17.30 og kl. 20 Hornvenjing.
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, Títtlingasangur kl. 17.30. Barnarøddir venja kl. 19.00.
Hóskvøldið kl. 20 Heimaforbundið, allar kvinnur vælkomnar.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í FKUK: Várgleði fyri børn.

**Meinigheitshúsið**
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími, Áps. 27, 1-26.
Mikudagin kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, filmskvøld.
Leygardagin kl. 16-18.30 Foreldur og børn hittast. Kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli har Gratia og Fríða & Maria syngja. Kl. 18 Møti við Sverra Steinhólm, Tær 4 syngja.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Missiónsvikan byrjar í kvøld kl. 20. Jógvan prestur talar og Streingjakórið syngur.
Mikukvøldið kl. 20 talar Mogens T. Christensen og Effata syngur. Bønarmøti er hvørt kvøld kl. 19.30.
Barnaansing í Meistarahúsinum. Missiónsvikan heldur fram vikuna út.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Olaf Olsen talar. Evni: Eitt sindur um lærusveinar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kirkjukjallarin í Gøtu**
Sjómanskvinnuringarnir í Leirvík, Fuglafirði, Hellunum, Oyndarfirði og Gøtu møtast til hugnaløtu o.a. í kirkjukjallaranum í Gøtu týskvøldið 25. nov. kl. 19.30. Torleif Jóhannesen veðrur við. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Missiónsmánaðurin endar hesa vikuna. Bønarløta er hvørt kvøld kl. 19.
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími við Ólavur í Mittúni, Jóhannes kap. 1.
Hósdagin kl. 20.30 venur Gospelkórið Gleði.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Møti við Hans Kristian Johannessen. Effata av Strondum syngur.
Leygardagin kl. 10 Áhugatími við Peter O. K. Olofson. Evnið: Ånden i glasset. Kaffi, te og rundstykkir verður at fáa. Kl. 19.30 verður møti við Leo Hans Mikkelsen, Ungdómskórið í Vágunum syngur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Bergur Debes Joensen. Gospelkórið Gleði og Dupultkvartettin í húsinum syngja. Innsavnan til Heimamissiónina. Nátturði eftir møti.
Kl. 21 Ungdómsmøti/eftirmøti við Bergur Debes Joensen. Gleði syngur.
Barnaansing er til øll tiltøkini. Møguleiki er at keypa bøkur, fløgur o.a. fríggja- og leygardagin. Ynskist bilur, so ring 457425. Øll hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini. Sí eisini okkara heimasíðu www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20 Heimaforbundið.
Onskvøldið kl. 19 Juniorsoldátmøti.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Føroyahúsið**
Sunnudagin 30. nov. kl. 17 verður evangeliskt møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn. Símun Pætur á Torkilsheyggi og Gunnar Nielsen luttaka. Á skránni verður eisini felagssangur og sangframførsla. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Sunnudagin 30. nov. kl. 15 verður bingospæl í »Loen« á Ryttergården í Pederstrup. Nógvir góðir vinningar til børn og vaksin. Byrjað verður við at tendra adventskransin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 24. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
kl. 14-18 Jólasøla
**Jólasøla og tombola verður alla vikuna á miðhæddini og í kjallaranum er loppumarknaður og bókasøla frá kl. 14-17. Inngongd frá miðhæddini.**
*Týsdagin 25. november*
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14-17 Jólasøla
*Mikudagin 26. november*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 14-17 Jólasøla
*Hósdagin 27. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Jólasøla
*Fríggjadagin 28. november*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 14-17 Jólasøla

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum*
*Mánadagin 24. nov.*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
*Týsdagin 25. nov.*
Drekkamuður. Ítrív fyri áhugað
*Mikudagin 25. nov.*
Hugnaløta v/ drekkamunni. Burturluting.
*Hósdagin 27. nov.*
Drekkamuður. Afturhvarv í práti og sangi
*Fríggjadagin 21. nov.*
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum. Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
*Mánadagin 24. nov.*
Tórálvur Mohr Olsen sigur frá upplivingum.
*Mikudagin 25. nov.*
Sólrun Christiansen lesur 15. brot úr søguni »Sin egen lykkes smed«.
*Mikudagin 3. desember*
bjóðar missiónshúsið í Skálavík til eitt jólahugnakvøld við døgurða og undirhaldið. Kostnaður 100 kr. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl. 17.30. Neyðugt er at tekna seg til tiltakið í Tilhaldinum ella á tlf. 361990 í seinasta lagi 26. november.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 13.00-16.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:** Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

## V4-dráttur
**í drátti nr. 1514**
**22. nov. 2003**

**Tølini:** 13 - 18 - 28 - 33 - 36 - 40 - 49 - 57 - 60 - 73 - 78 - 81 - 88 - 90 - 93 - 97

**Tríggir vinnarar**
Snars. nr. 2706946, Miðvágur
Snars. nr. 2717192, Tórshavn
Snars. nr. 2717521, Tórshavn

**Eykavinningur**
Í novemberspælinum er eykavinningurin 5.000 kr. um mánaðin í eitt ár. Drigið verður 29. november.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## PRÓGV

Arnleyg Svabo Haraldsen, Sandavágur, hevur á Hvidovre Hospital, Keypmannahavn, tann 31. 10. tikið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur.

## 90 ÁR

26. november fyllir Mia Hansen, Tórshavn, ættað frá Gjógv, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin **leygardagin 29. november millum kl. 14 og 17 í KFUK**. Tey, sum vilja heilsa uppá hana, eru vælkomin har.

## SILVURBRÚDLEYP

Í dag hava Bente og John Kjær, Hoyvík, verið gift í 25 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá silvurbrúðarparið eru vælkomin í hølini hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu 9, Tórshavn, har opið hús verður millum kl. 14 og 19 í dag. Øll eru vælkomin.

Týsdagin 9. desember hava hjúnini Anna og Leivur Sørensen, Syðrugøtu, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 30. desember kl. 20. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 441208, 442032 ella 456160 áðrenn 20. desember.



# VIÐMERKINGAR

# Einligir pápar hava als ongi javnrættindi!

**(Javnstøðan er ein einvegis ferðsla)**

**Pauli í Geil**
*Norðdepil*



Sonevnda javnstøðan millum kynini bæði hevur síðan BH-brenningin var í hæddini bert koyrt í einum sporið, tí kvinnuliga. Og hevur nakar stigið fram og víst á hetta vanbýti, verður viðkomandi bert róptur: eitt mans-sjavunistasvín! Hesin ólukku ójavni hevur eftir mínum tykki, og út frá egnum beiskum royndum volt vælferðarsamfelagnum stóran skaða, og eisini verið persónliga frælsinum at meini. Somuleiðis hevur hetta verið oyðileggjandi fyri familjumynstrið.

**Karrieran framum**
Hjá mongum er tað eisini komið har til, at karrieran verður sett hægri, enn tað menniskja, ið veruleikanum er sett av Gudi at fremja: At stovnað eina familju. Nógvar kvinnur eru hálvavegna, og í fleiri førum komnar upp í yvirgangsárini áðrenn tær seta tað fyrsta (og kanska tað einasta) barnið í verðina. Og í øðrum førum hevur lívfrøðiliga klokkan sligið, og tær fáa ongi børn.

Tá eg síggi menn, sum eru upp í 10 ár eldri enn eg sjálvur, vorðnir nærum hálva øld gamlir ganga og trilla barnavogn við tí fyrstfødda barninum, ja tá taki eg synd í teimum. Tí at verða ungur saman tá ið ein alir børnini upp, og eiga alla tað likamligu og sálarligu styrki, sum krevst til hesa stóru uppgávu (ikki smávegis uppgáva) má verða ein stórur fyrimunur fyri foreldrini. Kortini velja nógvar kvinnur, at karrieran skal toppa áður enn tað fyrstfødda verður borið í heim. Læknir vísa staðiliga á, at 23-30 ár eru bestu árini hjá kvinnuni at eiga børn síni, og hava somu læknar víst á vandarnir við at kvinnurnar bíða inntil hesi árini eru farin aftur um bak.

**Har menn valda og gjalda**
Har sum virki og arbeiðspláss eru stovnað av monnum, og ognarskarin eisini eru menn, har er tað natúrligt, at menn ráða, valda og gjalda. Sokallaður "kvinnurættur" og javnstøða kann í veruleikanum ikki koma uppá tal í hesum viðurskiftum. Taka vit dømi frá ídnaðinum og handverkinum, so er sjón fyri søgn, at tað sera fáar kvinnur, sum í heila tikið hava eina útbúgving ella hava arbeiðsroyndir, sum ger tær til sjálvskrivaðar leiðarar. Hevði tað ikki verið so, so hevði bílætið sæð øðrvísi út. Hetta eri eg onga løtu í iva um. Tað er upplagt, at mennirnir sum gjalda eisini valda!

**Ræðandi dømi**
Fara vit til tann stýrandi og dømandi partin av samfelagnum eru ræðandi dømi at finna. Hetta eru dømi, sum ídnu "javnstøðu- forsprákarnir", og tey sum virka innan hetta økið ongantíð taka upp á tunguna. Mest ræðandi dømi: Í danska kongaríkinum eru 4 út av 5 dómarum kvinnur. So gott, sum allir saksbehandlarir í familjurætti eru kvinnur. Og tað eri eg, og mangur annar pápar beiskliga sloppin at sanna, mong ólukkulig dømi eru um júst hetta. Í allarflestu av hesum málum døma hesir kvinnuligu dómarar ikki, sum dómarar, men sum kvinnur! Hørð orð, ja. Men mangur maður kundi stigið fram saman við mær, og skriva júst somu orð. Í hvussu er, eru dømini eru dømini 4 út av 5 møguligum har málini verða koyrd eftir einum einvegis frimili.

**Løggáva frá 1928!**
Løggávan á hesum økinum er 3/4 øld gomul. Hon er frá tíð Harrans ári, anno 1928! (1 ár áðrenn talufilmurin bleiv uppfunnin!) Hesi 75 árini hevur lógin virkað so gott, sum óbroytt. Hetta hevur givið ein grundleggjandi heilt skeivan og órættvísan framferðarhátt í hesum málum, tí lógin er so syndarliga ótíðarhóskandi! So skeivt verður farið fram, at menn í hesum ári, anno 2003 framvegis eru uttan mannarættindi og rættartrygd. Teir eru uttan møguleika fyri at kunna verja seg sjálvar, einasti (for)rætturin teir hava er at smíla tá barnapeningurin skal gjaldast við kassa 1.

**Broyting hend síðstu 20-30 árini**
Børnini eru ein sjálvsagdur rættur hjá kvinnuni. Og lívfrøðiliga eigur hon sjálvandi helvtina í teimum. Men ein stór broyting er farin fram síðstu 20-30 árini, um vit taka støðið í lógini frá 1928. Í dag er tað í flestu førum kvinnurnar, sum finna sær ein annan maka, og ikki mennirnir, mótsatt støðuni í 1928! Kortini verður tað roknað at verða í fínasta ordan, at tað er maðurin sum pakkar sekkin, og má rýma úr húsinum, frá syndarligu leivdunum og út í eina armóðstilveru har hann má byrja alt av nýggjum.

Einki og eingin talar fyri hann, ella hansara vegna tá rætturin talar! Og typiskt skal maðurin av við 30-50% av lønini hjá sær í 5 ár ella meira, alt eftir hvat fyrrverandi makin krevur. Maðurin hevur einki at siga, kvinnan kann týggja sær, sum hon vil. Børnini verða brúkt sum eitt sterkt vápn ímóti manninum. Og ikki bilar tað nakað, at ein kann vísa á nógvar veikleikar og manglar við kvinnuni. Nei! Hon er í einum kvinnuheimi, og opnar maðurin munnin so fær hann bert tess minni at siga, og fær typiskt ikki loyvi at vera saman við børnum sínum!

**Neyvan lógligt?**
Um hetta er lógligt ivist eg stórliga í. Men hetta er eftirhondini ein standard framferðarháttur móti manninum. Tey, sum varða av javnstøðuni í landi okkara oysa volapykk, gor og gall yvir okkum um "manglandi" javnstøðuni hjá kvinnuni. Manglandi javnstøðan hjá monnunum, sum hevur verið framd síðan 1928 verður ikki tikin upp á tungu. Feministarnir hava eitt sera turt og einfalt roknistykki, sum sigur: *4 kvinnur og 1 maður í eini nevnd ella høgum starvi = javnstøða!!??* Politisku flokkarnir, sum siga siga seg hava moral, etikk og siðsemi í spjaldri sínum hava sett kikaran fyri blinda eyga í hesum stóra álvarsmáli. Og tey, sum varða av lógarsmíðinum hava ov nógvar reyðar sokkar í klædnaskápum sínum. Og so fara tey ikki í arbeiðsklæðini, og brúka heldur ikki "amboðskassan" fyri at fáa lógina frá 1928 broytta, so hon javnstillar kynini bæði. Ringt er at byggja land við einum feministiskum baklandi, tað má ásannast!

**Javnstøða = kvinnuligt einaræði?**
So fyri okkara part kennist henda sokallaða "javnstøðan", sum ein táta. Einasta javnstøða vit kenna er í fótbólti! (1-1, 2-2). Tí spyrja mangir av okkum, um "javnstøðan" ikki er ein kamuflering fyri kvinnuligum einaræði?? Hvussu nógvar miljónir kundi samfelagið ikki spart, um familjurættur hevði verið familjuræ ttur, og ikki sum í dag: *kvinnurættur*, eina og aleina! Líkastillingin í verandi líki hevur so sanniliga spælt falitt, og kortini hevur ongin (mans)mót til at broyta henda ójavnan í mannarættindinum! Segði onkur: "kvinnuræðisnevnd"?

**Eigur tað at verða so?**
Eigur tað veruliga at verða so? Í so fall má undirritaði verða føddur 200 ár ov seint. Kæru fólkavaldu: Um tit eru ov bangnir fyri at lata eyguni upp fyri hesum trupuleika, bara fyri ikki at verða kallaðir: mans-sjavunistar. Ja so kunnu tit stinga í sekkin og fara heim. Tí verður hildið fram við hesum ójavna millum kynini verður skjótt galin endi. Er mansevni í tykkum, broyta tit hesa ólukku lóg frá 1928.

**Eitt ríkt lív**
Eitt ríkt lív eigur ikki at verða uppá uppskrift og lógaráseting frá Tinganesi. Men heldur eitt úrslit av okkara persónliga frælsi, sum menn og kvinnur. Takk fyri upptøkuna.

P.S. Míni 3 børn ynska øll at verða hjá mær. Men 2 teirra eru burturdømd at skula verða hjá mammuni niðri í Danmark móti sínum egna vilja.

Hvar eru rættindini hjá børnunum? Torir nakar at svara?


**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Týsdagin 25.11. kl. 19[30] Týsdagin 25.11. kl. 22[15]
Mikudagin 26.11. kl. 19[30] Mikudagin 26.11. kl. 22[15]
Hósdagin 27.11. kl. 19[30]




Týsdagin 25.11. kl. 20[45] Týsdagin 25.11. kl. 23[00]
Mikudagin 26.11. kl. 20[45] Mikudagin 26.11. kl. 23[00]
Hósdagin 27.11. kl. 20[45] Hósdagin 27.11. kl. 23[00]




**Billettprísur: 45,- kr.**
Týsdagin 25.11. kl. 17[15] Mikudagin 26.11. kl. 17[15]
Hósdagin 27.11. kl. 17[15]




Týsdagin 25.11. kl. 18[00] Mikudagin 26.11. kl. 18[00]
Hósdagin 27.11. kl. 18[00] – *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Hósdagin 27.11. kl. 22.15**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**